# Landið hungrar efti

**Metlága arbeiðsloysið heldur fram, og landið hungrar eftir arbeiðsmegi. Hjálp sigst vera ávegis frá Innlendismálaráðnum. Men ætlanin um at liberalisera útlendingalógina, hvørjum útlendskari arbeiðsmegi viðvíkir, er ikki uttan trupulleikar**

VANTANDI ARBEIÐSLOYSI

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Seinastu tølini frá Hagstovuni vísa eitt arbeiðsloysi á 1,5 prosentum. Sostatt heldur metlága arbeiðsloysið fram, og sostatt er støðan á føroyska arbeiðsmarknaðinum heilt óvanlig í altjóða høpi. Tí sambært Hagstovuni kemur bert hendingaferð fyri, at lond kunngera arbeiðsloysistøl lægri enn tvey prosent, verður viðmerkt frá Hagstovuni.

### Óheppið fyrsta pláss

Í evropiskum høpi liggja Føroyar á einum greiðum fyrsta plássi, hvørjum arbeiðsloysi viðvíkir. Á øðrum plássi liggur Ísland við tveimum prosentum. Danmark, sum eisini hungrar eftir arbeiðsmegi, liggur á einum fimta plássi við trimum arbeiðsloysisprosentum. í miðal liggur arbeiðsloysið í Evropa um stívliga seks prosent.

Sum stjórin í Vinnuhúsinum og formaðurin í Búskaparráðnum vísa á aðrastaðni á síðuni, er fyrsta plássið ikki nakað, ið

# Nýggja lógin í stuttum

**Nýggja uppskotið frá Innlendismálaráðnum leggur í høvuðsheitum upp til, at tað gerst lættari og skjótari at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum**

VANTANDI ARBEIÐSLOYSI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Saman við umsitingini og hinum ráðunum er landsstýrismaðurin við Innlendismálum í holt við at snikka eitt uppskot til, sum skal gera loysa trupulleikan á arbeiðsmarknaðinum.

Nýggja lógin, sum eftir ætlan verður sett í gildi á nýggjárinum, skal gera tað munandi lættari hjá ES-borgarum at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Talan er um »serliga skikkaða arbeiðsmegi«, og tað kann vera alt frá læknum til KT-fólk, og har er so ætlanin at gera ein sonevndan positivlista, har felt verður niður, innan hvørji starvsøki okkum vantar arbeiðsmegi.

### Einfaldari og skjótari

Grein trý í uppskotinum viðger treytirnar hjá EU-borgarum at koma til landið at arbeiða, og hesar treytir ganga í stuttum út upp á, at arbeiðsgevarin skal tryggja 30 tíma viku, og skal somuleiðis tryggja, at viðkomandi útlendingur arbeiðir undir somu lønar og setanarviðurskiftum, sum eru galdandi á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Ásetingin »væsentlige beskæftigelsesmæssige hensyn« verður ikki longur avgerandi.

Í uppskotinum er møguleiki hjá fremmandari arbeiðsmegi at skifta millum arbeiði og arbeiðsgevarar. Hetta merkir í stuttum, at tú sleppur undan at binda útlendsku arbeiðsmegina til ein ávísan føroyskan arbeiðsgevara og eitt ávíst arbeiðspláss. Í kladduni til uppskotið verður mælt til, at sonevndar vikarstovur fáa høvi at koma inn í myndina. Við vikarskipanini ber til hjá vikarstovuni at leiga arbeiðsmegina út til tað virki, sum tann dagin hevur brúk fyri henni.

# Heimsmet í búskaparligum býttleika

**Uppskotið um liberalisering av útlendingalógini kemur í tøkum tíma, heldur stjórin í Vinnuhúsinum, ið sigur vantandi arbeiðsmegina verða tekin um búskaparligan býttleika frá politiskari síðu**

VANTANDI ARBEIÐSLOYSI

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

- Tølini frá eru bert ein staðfesting av tí, vit hava ávarað um í fleiri ár, nevniliga at arbeiðsmarknaðurin hungrar eftir arbeiðsmegi.

Tað sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, um nýggjastu Hagstovutølini, ið vísa eitt metlágt arbeiðsloysi.

Hann vísir á, at óvanliga



*- Hetta er heimsmet í búskaparligum býttleika. Hóast politikararnir hava vitað av trupulleikanum við vantandi arbeiðsmegi í fleiri ár, er einki gjørt, sigur stjórin í Vinnuhúsinum um metlága arbeiðsloysið í Føroyum*

støðan á føroyska arbeiðsmarknaðinum ikki er eitt met, ið føroyingar kunnu vera ernir av.

- Hetta er heimsmet í búskaparligum býttleika. Hóast politikararnir hava vitað av trupulleikanum við vantandi arbeiðsmegi í fleiri ár, er einki gjørt, sigur stjórin í Vinnuhúsinum.

Hann vísir á, at byggi- og flakavinnan hava rópt eftir arbeiðsmegi í nøkur ár, men seinasta árið hava arbeiðsgevarar í so at siga øllum vinnum rópt eftir arbeiðsmegi. Men framvegis er so at siga einki gjørt frá politiskari síðu.

### Barnaarbeiði

Tølini frá Hagstovuni vísa, at vøksturin á arbeiðstakarum er størstur millum tey 16-19 ára gomlu. Økta unga arbeiðsmegin er sambært stjóranum í Vinnuhúsinum als ikki nøktandi.

- At fleiri ungfólk arbeiða er í lagi. Men hetta er als eingin varandi loysn. Og spurningurin er, um vit skjótt seta eitt annað met sum tað einasta ídnaðarlandið, ið hevur trupulleikar við barnaarbeiði, sigur Jan Mortensen bersøgin.

Hann vónar, at ætlanin um at liberalisera útlendingalógina, so útlendsk arbeiðsmegi lættari sleppur til landið at arbeiða, gerst veruleiki skjótast gjørligt. Kortini ivast hann, um nýggja uppskotið er nóg mikið.

- Ein liberalur ES-marknaður ger tað munandi lættari, men vit síggja, at í til dømis baltisku londunum er arbeiðsmegin longu við at verða troytt. Ein skal jú eisini minnast til, at Føroyar ikki eru einsamallar í neyðarrópinum um útlendska arbeiðsmegi. Kappingin um arbeiðsmegina verður ivaleyst stór, og tískil ræður um at hava so góðar livi- og arbeiðsumstøður sum gjørligt at bjóða útlendingunum, vísir Jan Mortensen á.